## Tem um politikk

– Eg gangi upp í politikk og fylgi væl við. Serliga nú val er útskrivað, royni eg at fylgja við í ymisku kjakunum sum eru. Seinast atkvøddi eg fyri Socialdemokratunum, og tað verða helst eisini teir, sum fáa mína atkvøðu hesaferð.



## … føroyskan mat

– Føroyskur matur er millum annað fisk og lamb, og tað dámar mær sera væl. Men skerpikjøt og annað av tí slagnum, er ikki júst mín sterka síða. Nú tú spyrt um hetta, vil eg gjarna rósa kokkinum á Hotel Føroyum. Hann ger framúr góðan føroyskan mat, og langomma ger eisini frálíkar fiskafrikadellur.

# Føroyskur danskari og

**Hann gjørdist fulltíðar yrkisleikari í juni í ár. Nakrar vikur frammanundan hevði hann fingið prógv í film- og mediavísind frá Københavns Universitet. – Tað kundi valla passa betur, sigur Tem Hansen, sum hevur umboðað Danmark á ungdómslandsliðum, men vónar at fáa fleiri fyri Føroyar**

### Fakta

**Navn:** Tem Willemoes Thordan Hansen
**Føddur:** 19. januar 1984
**Útbúgving:** Film- og mediavísind frá Københavns Universitet
**Feløg:** Køge Boldklub, B93, Brøndby, Fremad Amager og Lyngby

## Ítróttarprofilurin



**Rólant Waag Dam**
rolant@sosialurin.fo

Tem Willemoes Thordan Hansen er 23 ára gamal, býr á Islands Brygge og er fulltíðar yrkisleikari í SAS-liga felagnum Lyngby. Hvørki navn, bústaður ella starv ljóðar serliga føroyskt. Tað er tað fyri sovítt heldur ikki, men kortini eitt sindur.

Tem Hansen, sum flestu føroyingar kenna hann sum, er eisini føroyskur landsliðsleikari. Langomman og langabbin eru føroysk, og pápi Tem Hansen er eisini føddur í Føroyum.

Tað var ommubeiggi Tem Hansen, sum gjørdi hann varugan við, at hann kundi spæla á føroyska landsliðnum. Táverandi agentur hansara gjørdi FSF varugan við støðu Tem Hansens, og soleiðis varð hann presenteraður fyri føroyska fótbóltsheiminum.

Vit hava sett Tem Hansen stevnu inni í Mentanarhúsinum á Islands Brygge, og róliga byrjar hann at greiða frá. Róliga, tí sum hann sjálvur sigur: – Eg havi einki at skunda mær til. Tem Hansen gjørdist jú fulltíðar yrkisleikari síðst í júnimánað í ár.

### Passaði perfekt

– Eg var júst liðugur við útbúgving mína í film- og mediavísind á Københavns Universitet, so tað passaði perfekt til mín, at eg so kundi kasta meg útyvir fótbóltin fult og heilt í eina tíð. Frammanundan hevði eg annars altíð býtt tíð og orku nøkulunda javnt millum fótbólt og skúla, og tí kundi tilboðið valla komið eitt betri tíðspunkt hjá mær, sigur Tem.

At vera fulltíðar yrkisleikari merkir, at hann fær pengar fyri at venja og spæla dystir. Annars hevur hann frí.

– Sjálvandi venja vit meiri enn onnur, skulu hugsa meiri um hvíld og kost, men eg havi altso nógva frítíð, vísir Tem Hansen á. Hann leggur síðani aftrat, at hann nýtir lívið sum yrkisleikari, og at hann ongar trupulleikar hevur við at fáa tíðina at ganga.

### Langur vegur

Men vegurin til yrkisleiðina sum fulltíðar yrkisleikari hevur verið langur. Hóast hann ikki fyllir 24 fyrr enn komandi ár, hevur Tem Hansen longu umboða fimm feløg. Hann er uppvaksin í Køge, so tað var sjálvandi eisini har hann sleit sínar fyrstu gaggir. Sum tannáringur fingu fleiri feløg eyguni upp fyri honum, og Tem valdi at taka av tilboðnum frá B93. Eftir eitt skifti í B93 gjørdist Tem eitt sindur ósikkur upp á akkurát hvat tað var, hann vildi við fótbóltinum. Men tá ungdómsdeildin hjá Brøndby so vendi sær til hansara, valdi hann at taka av.

– Tað var ein fínur møguleiki, og tað er eisini har eg havi ment meg mest sum fótbóltsspælari. Har lærdi eg tað, eg dugi í dag og tað var eisini har, eg gjørdist tann fótbóltsspælarin, eg eri, greiðir Tem Hansen frá, sum í hesum tíðarskeiðinum hevði navnframa Tom Køhlert sum venjara.

Men hetta árið í Brøndby var tað smátt við spælitíð og honum longdist tískil aftur á vøllin. Fremad Amager hóskaði honum væl, kappingin var ikki heilt so hørð sum í ungdómsdeildini hjá Brøndby, og líkindini fyri spælitíð vóru munandi betri. Eitt tilvitað val frá Tem Hansen, sum ynskti at vísa hvør dugur var í honum, umfram at vinna sær eitt sindur av peningi við síðuna av lesnaðinum. Og tað má sigast at vera ein væleydnað ætlan hjá Tem, tí síðst í junimánað í ár hevði hann gjørt so mikið vart við seg, at SAS-ligu felagið Lyngby bjóðaði honum sáttmála.

– Eg ivaðist ongantíð, tá Lyngby bjóðaði mær sáttmálan. Eg tosaði eisini við Christian (Lamhauge Holst, blðm.), sum eg jú kendi frá landsliðnum, og hann helt heilt víst, at Lyngby var tað rætta fyri meg, sigur Tem Hansen.

### Stórt stig

Hann ásannar, at stigið frá Fremad Amager til Lyngby var stórt, men hetta var hann fyrireikaður upp á. Tí tekur hann tað heldur ikki so tungt, hóast tað ikki er vorðið til so nógva spælitíð enn.

– Her verður spælt spælt við einum nógv hægri ferð, men eg meti sjálvur tað gongur betur og betur undir venjing, og at eg nærkist hópinum, sum verður úttikin til dystirnar, heldur Tem Hansen, sum higartil hevur spælt tveir dystir í SAS-liguni. Tann seinasta farna vikuskiftið, tá hann spældi stóran part av seinna hálvleiki mitt á miðvøllinum móti Brøndby. Hetta er eisini júst tað, Tem Hansen strembar eftir í løtuni.

– Eg vóni at fáa nakrar dystir á besta liðnum áðrenn jól. Annars má eg bara vísa mítt virði í vetrarsteðginum, har vit spæla fleiri venjingardystir. Og inntil ta tíð fái eg í hvussu so er regluliga dystarvenjing á eykaliðnum, sigur Tem Hansen.

### Ivaðist við landsliðnum

Eins og Tem Hansen hevur spælt tveir dystir í SAS-liguni fyri Brøndby, hevur hann spælt tveir altjóða skrásettar landsdystir fyri Føroyar. Báðar ferðir er hann komin á vøllin sum innskiftari, og báðar ferðir hevur mótstøðuliðið verið Ukraina. Tem Hansen fegnast um møguleikan at sleppa at umboða Føroyar, men hann hugsaði seg tó væl um, áðrenn hann tók av tilboðnum.

– Um tað mundi eg fekk landsliðsboð úr Føroyum, var eg eisini aktuellur fyri danska U21-landsliðið. So eg hugsaði meg um, men tá samanumkom var tað ikki nøkur trupul avgerð, sigur Tem, sum hevur spælt tveir dystir á danska U19-landsliðnum.

– Dystirnir, vit spæla við Føroyum, eru móti nøkrum av heimsins bestu liðum, og tað er spennandi í sjálvum sær. Harumframt er tað stuttligt at vera við, fólkini í hópinum eru fitt, og so fái eg eisini høvi at vitja mína føroysku familju, heldur Tem Hansen fyri við einum smíli.

Hóast hann hevur verið í Føroyum áðrenn hann varð úttikin til landsliðið, og kendi til bæði føroyskan mat og sangir frá føðingardøgum, so dugir hann ikki føroyskt.

– Men eftir venjingarleguna í Spania í januar og fyrra dystin móti Ukraina, so bleiv tað lættari og lættari at skilja. So var eg ikki við í tveir dystir, so nú var tað aftur eitt lítið sindur trupult at skilja. Men málið er eingin trupulleiki. Fótbóltur er eitt alheimsmál í sær sjálvum, sigur Tem Hansen.

Hann vil tó kortini heldur enn fegin læra føroyskt.

– Tað vil eg heilt sikkurt. Eg og Christian (Lamhague Holst, blðm.) plaga at trætast um hvør dugir best av okkum, men hóast tað er ilt at meta um og skilja, so pástendur Christian, at hann dugir betri enn eg, flennir Tem Hansen.